# Sundstein kløkkur av deyðsboðunum

ATLI DAM FARIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard.*

Tað var ein skelkaður Jógvan Sundstein, sum legði hornið á í íbúð síni á Slotsvolden 5 í Holbæk, mánakvøldið, eftir at systir hansara hevði ringt og greitt honum frá at Atli Dam var sløknaður.

Seinastu 30 árini runnu fram fyri Jógvan, meðan hann gekk runt í nýggja heimi sínum, sum hann flutti í í fjør, fyri at vera nærri sínum børnum og barnabørnum. Deyðsboð kunnu ongantíð kallast aftur og slóðað altíð fyri djúphugsan og tankarnir leitaðu beinanvegin aftur til á heysti 1970, tá ið Atli og hann stillaðu upp til løgtingsval á fyrsta sinni og báðir blivu valdir.

– Vit hava havt so ótrúliga nógv saman bæði í samgongu og í andstøðu og tað er løgið at Atli ikki longur er okkara millum. Hann fór so óvæntað, meðan hann enn var virkin í arbeiðslívinum. Eg haldi at deyðsboð fara verri við mær í dag enn tey gjørdu fyrr, skilt á tann hátt, at nú er tað so ofta javnaldrar hjá mær, sum fara. Eg var nakrar mánaðar yngri Atli Dam, sigur Jógvan Sundstein.

### Álítandi maður

– Atli gjørdist løgmaður og eg endaði í andstøðu í 1970. Tá fyrstani lærdi eg hann at kenna. Áðrenn visti eg ber hvør hann var. Atli tordi at ganga nýggjar leiðir og í 1974 var stóra samgongan skipað millum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og javnaðarflokkin og hendan sat til 1980. Í hesum drúgva skeiði lærdi eg Atla at kenna sum ein serdeilis álítandi politikkara. Gjørdi tú eina avtalu við Atla Dam, so helt hann hana, sigur Jógvan Sundstein.

– Atli hevði ótrúligt tol í samráðingum og hann vildi finna loysnir, hann hevði eini ótrúlig evni til at tosa tingini til rættis. Avtalan við donsku stjórnina um undirgrundina er eitt gott dømi um hetta. Eg minnist Atla fyri tað góða, sjálvsagt hevði hann fíggindar í politikki, men eg taldist ikki millum teirra, sigur Jógvan Sundstein.



*Jógvan Sundstein og Atli Dam samstarvaðu í mong ár í politikki*

Eiler Jacobsen, reiðari:

# Atli var ótrúligur

ATLI DAM FARIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Skiparin, reiðarin og vinnulívsmaðurin Eiler Jacobsen ivast ikki eina løtu, tá hann verður spurdur hvussu Atli Dam royndist tey 16 árini hann sat sum løgmaður. Orðini liggja á varrunum og koma beinanvegin.

– Atli Dam var ein ótrúligur forhandlingsleiðari, tað var eg so ofta vitni til, tá hann stóð á odda fyri fiskiveiðusamráðingum úti í heimi. Hann var seigur, hann var treiskur og hann gavst ongantíð á hondum. Stóð í botni, so gav hann ikki upp, men legði hann aftur á aftur seinni, sigur Eiler Jacobsen.

– Vit vóru so víða og tingaðust um fiskirættindi. Í Portugál, í Russlandi, í Noregi og mangar aðrastaðir. Hann var samráðingarleiðarin, tað var hann sum førdi samráðingarnar, vit vóru ráðgevarar og hann dugdi væl at finna síðan ráðgevar. Atli var ótrúliga væl inni í tingunum. Hann visti alt. Hann kom avgjørt ikki tómhentur til eitt samráðingarborð og hann fór sjálvdan tómhentur frá einum samráðingarborði, sigur Eiler Jacobsen, sum er upptikin av at Krúnborg er komin aftur av næsta túrinum í eitt strekk við góðum fongi, tá ið Sosialurin ringir. Seinastu tveir túrarnar hevur hon veitt 6000 tons av svartkjafti vestan fyri Írland seinastu dagarnar í ringum veðri, og nú var tað ivasamt, um teir tordu til Føroya, tí sáttmálaviðurskiftini eru so ótrygg.

– Atli Dam var í velmaktini, tá samráðingarnar vóru millum hann og Halstein Rasmussen úr Noregi í sjeyti og áttatiárunum og norðmenn høvdu virðing fyri Atla. Og orsøkin til hetta var júst tann, at hann fylgdi so væl við, og var so væl inni í tingunum. Eg upplivdi javnan sum reiðari, at Atli ringdi til mín fyri at vita hvussu stóð til í flotanum og hvussu gekk við mínum skipum og tað var ikki bara til mín hann ringdi. Hann visti eins nógv og eg sjálvur um støðuna hjá flotanum og um viðurskiftini í fremmandu sjógvi, tí fekk hann so nógv burtur úr sum samráðingarleiðari, sigur Eiler Jacobsen.



*Eiler Jacobsen, reiðari, hevur stóra virðing fyri Atla Dam sum samráðingarleiðara*

Olaf Olsen, reiðari:

# Atli var ein sterkur politikkari

ATLI DAM FARIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tað, sum liggur fremst á varrunum, tá ið fyrrverandi politikkarin og reiðarin Olaf Olsen minnist samstarvið við Atla Dam ljóðar soleiðis:

– Atli Dam var ein sterkur politikkari og hann dugdi sera væl at greiða frá sínum sjónarmiðum.

Og so var hann álítandi eisini. Hann helt tað sum hann segði og tú kundi rokna við honum. Hann var heldur ikki "spidsfindigur" sum onkur annar, hann var greiður og tú visti hvar tú hevði han, sigur Olaf Olsen.

Olaf Olsen hevur tvær reisur verið landsstýrismaður, fyrru ferð sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum frá 1980-1983 og seinna skeiðið var frá 1989-91. Í báðum hesum skeiðum var Atli Dam í andstøðu.

– Vit vóru avgjørt ikki samdir í øllum politikki, men eg hevði stóra virðing fyri Atla Dam, sigur Olaf Olsen.